## DAGSINS MEINING

# Framtíð í altjóðagjørdum heimi

Leingi hevur verið hoyrt um visión 2015, og mong hava havt á orði, at landsstýrið átti heldur at brúkt sína orku til gerandisdagin her í 2006. Men sum løgmaður gjørdi vart við í síni framløgu, so eru Føroyar á einum vegamóti og hetta krevur, at vit nú taka nakrar álvarsamar avgerðir. Tað eru avgerðirnar, vit taka nú, sum skulu vísa, um vit megna at tillaga okkum treytirnar í einum alheimsgjørdum búskapi. Landsstýrið heldur, at skulu vit røkka hesum máli, er neyðugt við greiðum ætlanum. Tað er hetta Visjón 2015 m.a. snýr seg um. Endamálið við øllum hesum er at tryggja framtíðar vælferðina. Við hesum hevur samgongan so staðfest, at vælferðarsamfelagið verður ikki slept – heldur er tað tvørturímóti, at tað skal mennast og styrkjast.

Í gjár tann 23. februar varð so sjálv arbeiðsætlanin fyri Visjón 2015 løgd fram. Landsstýrið hevur valt at byggja visjónina á 12 grundarsteinar, sum skulu skapa grundarlagið undir at menna Føroyar til eitt av heimsins bestu vælferðarsamfeløgum. Tað mest áhugaverda er, at spurningurin um vælferðarsamfelagið verður skipað sum serstakt øki í visjónsætlanini. Á fundinum greiddi løgmaður frá sínum hugsanum um Visjón 2015. Hann greiddi frá, at visjónin um vælferð er grundað á hesi aðalmið, at okkara fremstu almanna- og heilsupolitisku mál eru, at fólkið skal trívast, mennast og fjølgast í okkara landi.

Hetta skal gerast við at tryggja øllum borgarum neyðugur umstøðar fyri góðum livikorum í einum vælskipaðum vælferðarsamfelag, har sínámillum ábyrgdin millum borgaran og myndugleikan eins væl og samhaldsfestið millum øll verður sett í hásæti. ætlanir fram í tíðina. Hetta er sera áhugavert, tí seinastu mongu árini hevur tað verið vanligt at hoyra, at tíðin við vælferðarsamfelagnum er farin – vit hava ikki ráð til at varðveita tað. Visjónin er, sum ofta nevnt, at Føroyar í 2015 skulu verða millum bestu lond at virka og liva í. Hetta krevur, at Føroyar skulu verða samfelag við sterkum búskapi, har arbeiði er til allar hendur, og har dygdargóðar, sosialar skipanir tryggja øllum eitt virðiligt og gott lív. Hetta er so aftur orsøkin til, at grundarsteinurin um vælferð er í eini serstøðu í visjónsætlanini, boðar landsstýrið frá í síni framløgu.

Tað verður áhugavert at síggja, hvussu tilgongdin verður frá nú av. Talan er um ein heilt nýggjan form fyri at reka politikk. Hetta sæst millum annað av, at borgararnir fáa høvi til á heimasíðu at taka lut í orðaskiftinum um, hvat slag av samfelag, vit skulu hava um tíggju ár. Men vandaleyst er hetta ikki, tí meðan vit flyta okkum fram ímóti 2015 eru stór og tung mál í dagsins samfelag, sum mugu avgreiðast og sum ikki kunnu bíða til 2015. Vit kunnu nevna pensiónsmálið, miðnámsámsútbúgvingarnar, bústaðartrupulleikarnar, læknatrotið, barnansingin og mong onnur. Hinvegin ber ikki til í einum altjóðagjørdum heimi at sita hendur í favn og bíða eftir, at onnur skulu leggja framtíðina til rættis fyri okkum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ótrúlig argumentatión

**ÓLAVUR Í BEITI**



Meta fólkafloks- og miðflokkapolitikarar, at vit menniskju eru ein fiskastovnur sum krevur stovnsrøkt ella hvat?

Nú hoyrdi eg tíverri ikki alt, Útvarpið nevndi viðvíkjandi einligum forsyrgjarum í kvøld í tíðindasendingini, men eg hoyrdi Anfinn Kallsberg, tingmann hjá Fólkaflokkinum, og eg hoyrdi hvussu nógv betri einligir forsyrgjarar hava tað í londunum uttan um okkum og sum vit javnan sammeta okkum við.

Eg veit tað, tí eg havi sjálvur búð niðri í nøkur ár, so eg veit júst, hvussu nógv betri umstøðurnar eru eitt nú í Danmark.

**Pengar halda hjúnum saman**

At vit mugu ikki gera umstøðurnar betri hjá einligum forsyrgjarum í Føroyum eitt nú við barnafadráttinum, tí vit vilja verja hjúnarbandið, nakað soleiðis hoyrdi eg at Miðflokkurin og Fólkaflokkurin høvdu sagt! Hetta var teirra argumentatión, at barnafrádrátturin for at syndra eitt hjúnarband!

Tað kemur spekulatión í hetta, um vit gera umstøðurnar betri hjá einligum forsyrgjarum!

Altso tað sum Fólkaflokkurin og Miðflokkurin óttast er, at gera vit umstøðurnar hjá einligum forsyrgjarum betri við eitt nú barnafrádráttinum, so verður talið av hjúnaðarskilnaðum hægri enn tað er í dag!

Tað vil siga talan er um eitt slag av stovnsrøkt, sum hesir báðir flokkar vilja hava!

Og tað eru pengarnir sum gera, at Miðflokkamenn og Fólkafloksmenn eru giftir menn í dag!

**Hugstoytt**

Tað er ótrúliga hugstoytt og so ómenniskjansligt at hoyra slíkt frá politikarum sum siga seg verða kristnir menn og sum siga seg at liva í einum kristnum landi og aftur og aftur hevja seg í hesum kristiliga, at alt sum ikki hevur sama inntøkugrundarlag og sama familjumynsur sum teir sjálvir hava er spekulatión og súgving av tí almenna júgrinum, og slíkt illgresið skal hungrast og pínast, tí tað er ikki annað enn til fortreð!

Ella er tað gamla og sanna orðatakið sum vit eiga: Tjóvur trýr øll stjala!

Vit liva í einum framkomnum landi, og vit hava júst í dag sett kósina móti, at Føroyar skulu verða eitt av bestu londunum at búgva í um ikki so mong ár, og vit eru sámiligir borgarar her, sum royna at fáa alt at hanga saman bæði á ein og annan hátt, eisini vit sum eru einligir forsyrgjarar, so tað átti ikki at verið eitt sovorðið orðalag á so fjákutun støði og við so tápuligari argumentatión!

Tí eru tað pengarnir sum gera allan munin, jamen so høvdu tey einligu ikki verið einlig men høvdu livað saman við einum sum hevði eitt gott og vælønt starv!

Og halda tit, at tað eru pengarnir sum halda einum hjúnalagi saman, hvussu ber tað so til at tað eru hjún sum skiljast í dag – nú meðan umstøðurnar hjá einligum forsyrgjarum eru sum tær eru!

**Kristin fundamentalisma**

Tað er ikki torført at finna fram til, hvussu nógv ein einligur forsyrgjari fær! Tað er heldur ikki torført at finna fram til, hvussu viðkomandi býr her í Føroyum! Eftirlitið er so gott, samfelagið er so lítið og øll vita alt um øll, so at vit fáa dansk-muslimskar tilstandir her, tað er púra óhugsandi!

Men slík agrumentatión sigur mær sjálvandi eisini, at tá ikki skott er millum kristindómogpolitikk so verður orðalagið ein vavgreytur – kristin fundamentalisma ílatin politiskan ham!

Vónandi er nýggja føroyska samfelagið – eftir 2015 – ikki bara eitt samfelag við fólkafloksmonnum og miðflokkamonnum, men eitt samfelag sum er eitt rikt samfelag og sum eisini tolir at hava einligar forsyrgjarar, sum av eini ella aðari orsøk komu út í hesa støðu.

Og lat meg eisini skunda mær at siga og geva tí ein social politiskan dám, sum bæði Fólkaflokkurin og Miðflokkurin kundu tikið meiri av í teirra politisku skrá, at vónandi verða tað heldur ikki so nógvir pengar í at verða einligur forsyrgjari, at hetta verður familjan anno 2015!

Tað er ikki tað eg hugsi um!

# Framsýning í Miðlahúsinum

Í døgunum 13. til 24. februar hvønn seinnapart frá kl. 13 til 16 hevur verið skipað fyri skeiði kallað »Rúmd« á dagdeildini Varðanum, á Psykiatriska deplinum. Skeiðið hevur verið skipað sum verk-staðararbeiði, einsæris og í felag. Á skeiðnum hevur verið arbeitt við at menna egin hugskot bæði í myndlistarligum og tónleikaligum høpi. Skeiðið hevur verið úrslitavent fyri at menna sjálvsvirðið hjá brúkarum, ið hava samband við psykiatriska depilin, við at stuðla teimum í at geva sínum myndandi evnum skap og sýna fram úrslitið av hesum arbeiði í Miðlahúsinum.

Framsýning og framførsla verða leygardagin 25. februar kl. 15 til 17 í Miðlahúsinum í Vágsbotni, sigur Dagdeildin Varðin á Psykiatriski depilin á Landssjúkrahúsinum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa ræktuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar. Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.